# Svend Auken fer at hitta javnaðarfólk

VITJAN
*Tíðindaskriv*

Í annaðkvøld, sunnukvøldið kl. 19.30, skipa Javnaðarflokkurin og Suðurstreymoyar Javnaðarfelag fyri einum hugnakvøldi saman við navnframa danska javnaðarpolitikaranum Svend Auken. Svend Auken fer at tosa um ymisk aktuel mál og aftaná verður kjak, sum vónandi verður bæði spennandi og kveikjandi.

Svend Auken hevur áður verið á fundum og stevnum hjá bæði Javnaðarflokkinum og Suðurstreymoyar Javnaðarfelag, og hevur tað verið sera áhugavert at hoyrt tað, sum hann hevur borið fram.

Svend Auken er ein sera royndur politikari, og hevur hann havt mong ymisk álitisstørv í danska Javnaðarflokkinum. Svend Auken varð fyrstu ferð valdur á fólkating í 1971, og hevur hann havt sætið har síðani. Hann var formaður í Javnaðarflokkinum frá 1987 til 1992. Harumframt hevur hann verið ráðharri í arbeiðsmarknaðarmálum og orku- og umhvørvismálum. Somuleiðis hevur hann havt álitisstørv innan Javnaðarflokkin bæði í norðurlendskum, evropeiskum og altjóða høpi.

Hugnakvøldið verður í hølinum hjá Starvsmannafelagnum, J.H. Schrøtersgøta 9.

- Vónandi fara nógv javnaðarfólk úr øllum landinum at nýta høvi at hitta Svend Auken, siga Javnaðarflokkurin og Suðurstreymoyar Javnaðarfelag.

## Kært barn har mange navne

Fríggjakvøldið og leygarkvøldið spælur ein bólkur ið kallar seg Leikmenn í Café Nattúr. Hetta er ein partur av bólkinum "EGR2PLZ", sum eisini er kendur sum "Orkestriiiið her vestriii" ella "Four Aces", sum uppaftur er ein partur av nú burturgingna bólkinum Fluffy Toys.

Leikmenn eru báðir gittarleikararnir í omanfyri nevndu bólkum, Bjarti og Dagfinn. Teir fara at spæla góðan kendan tónleik, bæði gamlan og nýggjan, og uttan iva man 1 veit iiii fara at verða millum løgini.

**nud**

## 2x Signar á Sandi

Leygarkvøldið fáa sandingar og sandoyingar annars høvið at hoyra Signar í Homrum ikki færri enn tvær ferðir, fyrst í Texas og síðan saman við bólkinum Rok í Virkinum.

Signar, ið gjørdist heimskendum í Føroyum við bólkinum Kjølum, hevur seinastu árini verið virkin, sum einstaklingur og í ROK. Í Prix Føroyum í ár, vístu Rok, at teir eisini meistra lagaskriving. Signar spælir í Texa frá kl 21.00 til kl 23.00. Síðan fara Rok at spæla til dans í Virkinum.

**nud**

## Spaðar 5 í REX

Vælumtókti bólkurin hjá Joen Magnusi Danielsen og Ólavi Øster Spaðar 5 spælir leygarkvøldið til dans í REX.

The grand old man í føroyskum tónleiki Ólavur Øster hevur í 30 ár verið millum Føroya allar bestu gittarleikarar, meðan Joen Magnus hevur verið ein markant songrødd á føroyska tónleikapallinum síðan fyrst í 90'árunum. Í Spaðar 5 møtast hesir báðir í eini frálíkari samanseting, sum stuðlað av einum góðum bólki megnar at fylla eitt hvørt dansigólv. Hetta kvøldið er 25 ára aldursmark í REX.

Fríggjakvøldið er REX karmur um 80'ára discoteque við Ottar í Funningsstovu.

**nud**

## Holgar og Villmenn í Havn

Undirsjóvartunnilin millum Vágarnar og Streymoynna, hevur havt nógv at týða fyri vágafólk og tey sum skulu til Vágarnar. Men hetta vikuskiftið verður tunnilin nýttur til útflutning av Føroya bestu kontripunkarum, og ja, Glitnir verður ongantíð tað sama aftur.

Bæði fríggja- og leygarkvøldið spæla Villmenn í Glitnir.Teir lova havnarfólki eina rúgvu av slagarum, kontri, rokk og tað meira fólksliga.

Vágasound hevur fingið ein heilt nýggja dimensión í Villmonnum, hetta er ivaleyst Føroya garrvillasti dansibólkur, á G! og MjúS vóru teir frálíkir, nú fyrireika teir seg til Global Battle og the Bands og eru í toppformi.

**nud**


## FRÍTÍÐARUNDIRVÍSINGIN Á OYRARBAKKA VETURIN 2005/2006

| | Dagur: | Klokkan: | Undirvísari: | Telefon: |
|---|---|---|---|---|
| Motiónsfimleikur menn | Mánadag<br>Fríggjadag | 21.00 - 22.18<br>21.00 - 22.18 | Erling Petersen | 423194 |
| Postalínsmáling (Eftir nýggjár) | Týsdag | 18.45 - 22.15 | Eyðna Johansen | 422335 |
| Klænkiskeið | Mikudag | 18.30 - 22.00 | Edna Einarsson | 421289 / 217089 |
| Fimleikur kvinnur | Týsdag | 19.30 - 20.48 | Lovisa Ellendersen | 268401 |
| Kórsangur | Mánadag | 19.00 - 21.15 | Hans Oliver H. Joensen | 422472 |
| Dreying | Mánadag | 18.00 - 21.30 | Terji Johannesen | 580084 |

Øll undirvísing er treytað av nóg stórari luttøku og góðkenning frá myndugleikunum. Luttøkugjaldið er 300 kr. fyri hvørja lærugrein, tó 500 kr. fyri motiónsfimleik menn, og tað skal verða flutt á konto skúlans nr. 6460-1001908 í Føroya Banka beinanvegin, tá ið undirvísingin er byrjað. Skúlanæmingar gjalda 30 kr. Fráboðan og nærri upplýsingar hjá faklærara.

**FELAGSSKÚLIN Á OYRARBAKKA** • TEL 422 084



## HÚS TIL SØLU



**Húsini standa norðuri í Sund 57 í Kollafirði**
**Tey eru betonghús klødd við timburi, og eru bygd í uml. 1942**
**Grundøkið er uml. 665 m²**
**Nógv renovering er gjørd frá 2000 og fram, húsini hava sera gott útsýni.**

**Prísuppskot kr. 900.000,-**
**(Vera seld um hóskandi boð fæst)**

**TEL 21 16 49 / 22 76 49**



## Hús í Fuglafirði til sølu

Vegna Føroya Skiftirætt verður ognin matr. nr. 562, Fuglafirði lýst til sølu



Grundøkið: 211 $m^2$
Húsini eru í trimum hæddum, grundvíddin er 51 $m^2$

**Kjallari:** Óinnrættaður

**Miðhædd:** Gangur, køkur, baðiverilsi, stova og gongd til trappu.

**Loft:** 3 kømur, hjúnarúm og wc.

Ognin verður seld um hóskandi boð fæst
.
Nærri upplýsingar um ognina fáast við at venda sær til:

Advokatskrivstovuna
Fr. Petersensgøta 9 · Postbox 6 · FO-110 Tórshavn
Tel (298) 31 11 45 · Fax (298) 31 15 25
**att: Fríða Patursson, adv.** frp@jura.fo ella maj@jura.fo

Sosialurin 341800





**Hús í Hvannasundi til sølu**
**Ring á tel 452151 ella 252084**



# Tilboð

Biðið verður um tilboð til at taka hús okkara omanfyri saltsiloina á Drelnesi niður, burturbeinað tilfarið og planera økið aftur.

Tilboðini skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. oktober, og skulu sendast til **Suðuroyar Sjómansheim v/Albert Johannesen, 826 Trongisvágur.**

**Suðuroy Sjómansheim**
v/Albert Johannesen
826 Trongisvágur
Tlf. 372872



Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo